Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 26.02.2024
Mál nr.: 22/16183

Fylgiskjal 1

Ummælisskjal

viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um pantskipan fyri íløt

Uppskotið hevur verið í almennari hoyring og ligið á heimasíðuni hjá Umhvørvismálaráðnum og Føroya Landsstýri í tíðarskeiðinum 6. desembur 2023 til 5. januar 2024.

Uppskotið hevur harumframt verið til ummælis hjá:

Handilsvinnufelagnum
IRF
TAKS
Rúsdrekkasølu landsins
Fíggjarmálaráðnum
Løgmansskrivstovuni
Umhvørvisstovuni
Føroya Kærustovni

Inn komu ummælir frá Umhvørvisstovuni, Matvørubúðini í Nólsoy, TAKS, Rúsdrekkasølu Landsins, Handilsvinnufelagnum og Føroya Bjór og Føroya Kærustovni.

Eftir áheitan frá Handilsvinnufelagnum er ein nýggj áseting í § 2, stk. 6. har landstýrisfólkið ásetir reglar fyri eini nevnd, sum hevur til uppgávu at ráðgeva pantumsitaranum í sambandi íløgum og rakstri. Annars førdu ummælini til, at nakrar orðingar vórðu broyttar fyri betri greidleika.

Í viðgerðini av ummælunum niðanfyri verður støða bara tikin til spurningar, misskiljingar ella atfinningar, so ummælini verða ikki endurgivin í fullum líki í hesum skjalinum, men liggja við sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

Ì sambandi við eftirkanningina hjá lógartænastuni bleiv avgjørt, at flyta nakrar av ásetingunum í kunngerðini til lógaruppskotið. Hetta hevur ført við sær, at ummælini ikki longur vísa til røttu

ásetingar. Fyri ikki at ørkymla lesaran, eru tilvísingarnar í ummælunum settar í klombrur, og vísa til har umtalaðu ásetingar standa í tí dagførda lógaruppskotinum.

Brot úr ummælunum standa við skráskrift.

Umhvørvisstovan:

[§2 stk. 4.] Ber til at nýta hugtakið "loyvishavarar" ístaðin fyri "innflytarar og framleiðarar"

Sambært galdandi lóggávu um pant á íløtum skulu framleiðarar og innflytarar søkja um loyvi til at flyta inn og selja vørur í íløtum fevndum av lógini.

Í uppskotinum til nýggja lóg og kunngerð um pantskipan er einki krav um loyvi til sølu og innflutning, og tí kann hugtakið "loyvishavarar" ikki nýtast um innflytarar og framleiðarar.

Aftaná [§2 stk. 4] kundu verið eitt brot við allýsingum av til dømis Rakstrargjald og Móttøka.

Tað er sett inn sum § 1 í tí dagførda uppskotinum.

[§14] Tað kann vera óheppi at nevna upphædd (0,50 kr) í lóggávu, tí inflationsviðgerð kann gerast viðkomandi sum tíðin frálíður.

§ 14 er ein skiftisáseting, sum bara geldur í fýra mánaðir, sbr. § 13, stk. 4.

50 oyrur fyri hvørt ílatið er upphæddin, sum IRF metir at rakstrargjaldið fer at liggja um tað fyrsta árið.

Skal henda upphæddin vera oman fyri ella niðan fyri 50 oyrur, tá ið restin av pantskipanini fær gildi, eftir ætlan 1. oktobur 2025, verður dagført sambært mannagongdini í § 12 í kunngerðaruppskotinum.

[§14 stk. 3] skal hetta skiljast sum at fram til 1. oktober 2025 verður tað einans IRF, sum er pantumsitari og at hetta kann broytast um kunngerðin broytist?

IRF verður ikki pantumsitari, fyrr enn kunngerðin kemur í gildi, eftir ætlan 1. oktobur 2025.

Tað verður IRF, sum eftir ætlan verður útnevnt til pantumsitara sambært § 3 í lógaruppskotinum, og § 14 endurspeglar partar av teimum skyldum og rættindum í sambandi innkrevjing og afturbering av panti og rakstrargjaldi og skrásetingum, sum IRF fær sum útnevndur pantumsitari sambært § 3 í kunngerðaruppskotinum.

Til [§ 8 stk. 7 í kunngerðaruppskotinm]: Er undantakið bara fyri at taka ímóti øllum íløtum? Skulu tey enn taka ímóti tí, sum tey sjálvi selja? Hvussu við matstovum og øðrum har man ikki fær íløtini, hvussu vera hesi avhenda til IRF/pantumsitaran?

Talan er um fult undantak frá allari móttøkuskyldu, og viðmerkingin er rættað, so tað stendur heilt greitt.

Matstovur, barrir og onnur sølustøð, sum ikki hava móttøkuskyldu, verða ikki fevnd av skylduni hjá IRF at heinta íløt.

Matstovur og barrir eru sambært galdandi lóggávu vanliga ikki fevnd av skylduni at taka ímóti íløtum, við tað at hesar oftast bara selja innihaldið og ikki fløskuna sjálva.

Vanliga er tað veitarin (framleiðarin og/ella innflytarin) av drykkjuvøruni, sum tekur íløtini við sær, tá ið hann kemur við nýggjari vøru, og einki í nýggju pantskipanini forðar fyri, at hetta heldur fram. Framleiðarar og innflytarar hava sambært kunngerðaruppskotinum rætt til at avhenda og avrokna íløt beinleiðis hjá pantumsitaranum.

§ 8 [í kunngerðaruppskotinum sum ásett við heimild í § 5 stk. 3 í lógaruppskotinum]*: tað kann hugsast, at hesar ásetingarnar um móttøkutíðir eru ov avmarkaðar til at nøkta tørv hjá fólki at kunna lata inn íløt bæði í og uttanfyri arbeiðstíð.*

Vanlig sølustøð skulu taka ímóti íløtum í minsta lagi átta tímar um vikuna í upplatingartíðini, og góðkendar móttøkur og sølustøð, sum taka ímóti fyri onnur sølustøð sambært avtalu, skulu taka ímóti íløtum í minsta lagi 30 tímar um vikuna millum kl. 07:00 og kl. 22:00.

Tá ið takast skal ímóti íløtum, kann tað órógva ta vanligu arbeiðsgongdina, serliga hjá smáum sølustøðum við ongari fløskuautomat, at fólk møguliga mugu fara frá kassanum at telja upp. Hetta kann skapa kø og ónøgd við kassan.

At avmarka móttøkutíðina til 8 tímar um vikuna í upplatingartíðini, og at lata sølustøðini sjálv gera av móttøkutíðirnar, gevur sølustøðunum møguleika at leggja tíðirnar, tá ið tey eru best mannað til uppgávuna.

Eitt sølustað við fløskuautomat tekur vanliga ímóti íløtum í allari upplatingartíðini. Ein fløskuautomat av tí bíliga slagnum kostar nakrar hundrað túsund krónur, og tí skal ein størri nøgd av fløskum ígjøgnum, áðrenn ein slík íløga ber seg við vinninginum, sum stendst av, at fólk oftast keypir vøru frá sølustaðnum fyri pantpeningin.

Matvørubúðin í Nólsoy:

1.
Vit síggja at bakarí, pylsuvognar, og bryggjarí fáa undan tøk at taka í móti øllum pant íløtum, eg sum eigi og reki Matvørubúðina í Nólsoy haldi so avgjørt, at ein tílíkur Matvøruhandil sum tann í Nólsoy eisini burdi sloppi við undantaki, og bara tikið í móti teimun íløtum sum vit sjálvi selja.

Tað grundleggjandi hugskotið við tí nýggju pantskipanini er, at kundin skal sleppa av við øll pantáløgd íløt á sama stað.

Tí er tað, at ávís sløg av sølustøðum eru heilt uttan fyri pantskipanina heldur enn at hava lutvísa skyldu at taka ímóti íløtum.

Grundgevingin fyri fullum undantaki frá móttøkuskylduni kann vera alt ov lítið pláss, og at matgerð samstundis fer fram á sama tronga plássi, t.d. í pylsuvognum og øðrum matvognum ella á smáum kaffistovum, matstovum og bakaríum.

Størri matstovur ella kantinur á arbeiðsplássum og skúlum og sølustøð, sum bara hava nakrar fáar vørur fevndar av lógini til sølu við kassan, t.e. timburhandlar, amboðshandlar, venjingarmiðstøðir o.a., eru undantikin av fyriliti fyri tí sera høga kostnaðinum, sum pantskipanin hevði mugað borið fyri flutning frá hvørjum einasta stað í landinum, sum á ein ella annan hátt selur ella kann selja drykkjuvørur fevndar av lógini.

Pantumsitarin skal gjalda og syrgja fyri flutningi av íløtum frá sølustøðunum, sum hava skyldu at taka ímóti. Væntandi verður flutningskostnaðurin ein týðandi partur av kostnaðinum av pantskipanini, og fyri at halda hesum kostnaðinum niðri er neyðugt skera ígjøgnum við atliti at, hvør ið fær skyldu at taka ímóti íløtum, og hvør ið verður undantikin. Matvøruhandlar hava higartil verið tað vanligasta staðið at selja fløskur, og av tí at ætlanin er at halda fast við hetta í tí nýggju pantskipanini, verður í útgangsstøðinum einki undantak ásett fyri hesar.

Sambært § 8, stk. 6 í kunngerðini skulu sølustøð hjá føroyskum bryggjaríum hava skyldu at taka ímóti tí, sum tey sjálvi selja. Henda avmarkaða skyldan er tó ikki ókeypis, um tikið verður av møguleikanum, tí eftir ætlan skal bryggjaríið sjálvt syrgja fyri og gjalda fyri at flyta tóm íløt av sølustaðnum í skiljihøllina hjá pantumsitaranum.

2.
Um summari er sera nógv virksemi í Nólsoy, har nógv lív er, er ofta sera nógv íløt sum pant er á. T.d Øl, vín, dósir og sodavant í stórun tali. Hetta skulu vit eftir galdandi lóg taka í móti og geva pant fyri. Vit kunnu t.d taka Maggies, sum í princippinum kann koyra alt oman í handilin hjá okkum at selja, vit kunnu taka øll børn, sum samla øl blikk á ovastevnu, tey kunnu eisini koma í handilin og selja.

pop up cafe ír, Maggies, neystcafe, ella kunningarstovan kunnu uttan problem bara koyra alt í handilin hjá okkum, umframt øll onnur sum koma til Nólsoyar. Allir summarhús gestir, veitslur o.a kunnu bara levera til handilin,

Hesar viðmerkingarnar snúgva seg mest um ta øktu arbeiðsbyrðuna av at skula taka ímóti íløtum til vín, brennivín og øl, sum kann fara at liggja á handlum ávísar dagar ella tíðarskeið í árinum, tá ið óvanliga nógv gongur fyri seg í nærumhvørvinum.

Lógaruppskotið heimilar í § 5 landsstýrisfólkinum at gera undantøk frá móttøkuskylduni, bæði fult og lutvíst. Henda heimildin kann eisini brúkast til at loyva ávísum sølustað við móttøkuskyldu undantak frá fullari móttøkuskyldu í eitt tíðarskeið, har vandi er fyri, at sølustaðið kemur undir ovurhonds trýst at taka ímóti íløtum, t.d. í sambandi við bygdarstevnu ella annað tiltak . Sett er tí inn í § 8, stk.1, í kunngerðaruppskotinum, at "Landsstýrisfólkið kann í serligum føri, og í eitt ávíst tíðarskeið, geva undantak frá fullari móttøkuskyldu...".

Aftur at hesum skal viðmerkjast, at sølustøð kunnu leggja sínar upplatingartíðir, tá ið best liggur fyri ella minst órógvar at taka ímóti íløtum. Sí meira um hetta í nr. 7 niðanfyri.

3.
og vit gjalda út fyri so kanska við at bíða í langa tíð aftur fáa pengar frá IRF.

Vit hava hvørki pláss, ella kapital at gjalda pant út til øll hesi íløt, sum koma til Nólsoyar. Vit skulu gjalda út pant við kassa 1, fyri síðan einaferð, tá IRF hevur heinta fløskurnar og sagt gott fyri teimum, fáa pantið aftur.

Eingin orsøk er at halda, at pantumsitarin fer bíða í longri tíð við at flyta peningin, tí øll uppteljing av íløtum frá sølustøðunum fer at ganga skjótt fyri seg í skiljihøllini hjá pantumsitaranum við ídnaðarmaskinum, sum eru gjørdar til endamálið. Allar upplýsingar um støddd og nøgd og tí eisini upphæddina, sum gjaldast teimum ymisku sølustøðunum, eru tøkar sum dátur hjá bókhaldinum, samstundis sum íløtini eru tald upp. Pantumsitarin skal heldur ikki bíða eftir peningi frá innflytarum og framleiðarum, tí hesir gjalda leypandi pantskipanini allan pantpeningin gjøgnum TAKS í sambandi við innflutnings- og framleiðslugjald. Tí verður ikki beinleiðis samband millum, nær innflytarar og framleiðarar gjalda inn, og nær pantið verður goldið sølustøðunum.

4.
Vit skulu hava eina app, á telefon fyri at tjekka íløt, og tað hava vit ikki arbeiðiskraft til í einum lítlumhandli sum í Nólsoy.

Hetta er ein misskiljing. Einki sølustað skal hava eina app fyri at lesa íløt av. Ætlanin er at menna eina app, sum øll kunnu lesa inn á telefonina, og sum ger tað møguligt at lesa strikukotuna á íløtum av og fáa boð um, um eitt ílat er fevnt av panti ella ikki. Tað verður tó bara í ivaføri og sjáldan, at tørvur verður á at nýta appina, tí sambært kunngerðaruppskotinum koma allar drykkjuvørur og óblandað saft/konsentrat í plasti, blikki ella glasi undir pantskyldu, so leingi talan ikki er um drykkjuvørur við mjólk ella mjólkarúrdrátti. Tað verður tí ikki ofta, at ivi fer at valda, um eitt ílat er kemur undir pantskyldu ella ikki.

Sølustøð mugu tó nýta eina app til at lesa av og skráseta koduna á pantsekkjunum, tá ið teir eru fullir, so at pantumsitarin gjøgnum skipanina sjálvvirkandi kann fáa boð um, hvussu nógvum fullum sekkjum hvørt einstakt sølustað liggur inni við.

5.
Vit yvast eisini um Heilsufrøðisliga starvsstovan vil góðtaka, at vit mótaka øll hesi íløt á sama stað, í sama rúmi sum óinnpakka frugt og vøru kemur inn.

Fer Heilsufrøðiliga starvsstovan í framtíðini at gera serligar reglur fyri, hvussu pantíløt og matvørur skulu handfarast í mun til hvør annað, verður pantlóggávan dagførd samsvarandi.

6.
Tær fløskur vit sjálvi selja, har geva vit pant og senda retur til havnar. Her hava vit so møguleikar at leggja eitt sindur eyka uppá vøruna, soleiðis at vit ikki hava undirskot av at frakta alt til havnar. Vit skulu jú minnast til at Matvørubúðin far ikki vøru fraktfrítt til Nólsoyar.

Pantumsitarin syrgir fyri, at íløtini verða heintað á sølustaðnum, og rindar fyri flutningskostnaðin.

7.
Vit skulu leggja pláss og arbeiðis kraft til, sum viðførur bæði at vit mugu leggja pengar út, goymslupláss og arbeiðiskraft til hetta arbeiði, tað lønar seg ikki og viðførur eyka útreiðslur sum við lóg vera áløgd okkum sum ein matvøruhandil í nólsoy.

Eitt sølustað við móttøkuskyldu hevur ikki skyldu at taka ímóti íløtum í allari upplatingartíðini. Ein handil sum tann í Nólsoy hevur sambært § 8, stk. 2, í kunngerðaruppskotinum skyldu at taka ímóti íløtum átta tímar um vikuna í upplatingartíðini

og kann býta hesar tímarnar út á tær tíðir, tá ið best liggur fyri. Verður lagt til rættis eftir umstøðunum, nýtist uppgávan at taka ímóti íløtum ikki at gerast størri enn í dag, um handilin í dag tekur ímóti í allari ella stórum parti av upplatingartíðini.

Sum nevnt í nr. 3 omanfyri, sbr. eisini nr. 2 omanfyri og nr. 8 niðanfyri, er eingin orsøk at halda, at sølustøð koma í gjaldføristrupulleikar orsakað av tí øktu skylduni at taka ímóti íløtum. Pantumsitarin fær skyldu at heinta íløt so títt, at tey ikki hópast upp á sølustøðunum, og fer ikki at hava nakra orsøk at bíða við at gjalda sølustøðunum pantið aftur.

8.
Tað er ikki lagt upp til, at teir handlar sum taka íløt inn fáa nakað gjald fyri goymslu ...

IRF kann heinta tá handilin sigur frá:
Hetta ljóðar sera gott, men vit sum hava sjógv í millum oyggjar, vita at IRF kemur ikki tá vit hava 3
posar fullar, ella 5 posar sum vit seta sum MAX at hava inni.

Við tað at sølustøðini fáa skyldu at taka ímóti øllum pantáløgdum íløtum, er eisini neyðugt at lætta um arbeiðið at taka ímóti íløtum og syrgja fyri, at tað ikki verður meira tyngjandi at goyma íløtini enn í dag.

Í dag skilja sølustøðini eftir tilfari, slag og veitara, og nógv tíð og pláss fara til halda skil á øllum hesum. Í tí ætlaðu pantskipanini skulu sølustøðini bara skilja eftir tilfari. Dósir og plast fara í ein sekk og glas í ein annan. Hetta tekur lítið pláss, er lætt at halda skil á og tekur bara ein brotpart av tíðini, tað tekur at skilja í dag.

Pantumsitarin hevur sambært § 10, stk. 1, í kunngerðaruppskotinum skyldu at heinta íløt so regluliga, at tey ikki rúgvast upp á tí einstaka sølustaðnum. Henda skyldan at syrgja fyri, at sølustøð ikki koma í goymslutrupulleikar orsakað av tí lógarkravdu móttøkuskylduni, geldur líka nógv fyri Nólsoy sum Tórshavn, og til ber ikki at sleppa undan skylduni við tí grundgeving, at sjógvur er ímillum.

Flutningskostnaðurin av at fara til Nólsoyar eftir íløtum er hægri enn har landfast er, men § 3, stk. 2, í lógaruppskotinum heimilar stuðul til loysnir, sum minka um útreiðslurnar hjá pantumsitaranum av at lúka sínar skyldur. Eitt nú kann pantumsitarin heilt ella lutvíst rinda sølustaðnum fyri leigu av eyka goymslurúmi ella bingju at goyma íløt í, um hetta loysir seg sammett við flutningskostnaðin av at skula heinta íløt dagliga ella fleiri ferðir um vikuna.

TAKS (Viðmerkingin er í fullum líki niðanfyri.)

- Í uppskoti til løgtingslóg um pantskipan fyri íløt stendur í [§ 14, stk. 2,] at innflytarar og framleiðarar skulu lata Taks tær upplýsingar, sum innkrevjingarskipanin hjá Taks krevur. Upplýsingar skulu ikki latast til innkrevjingarskipanina hjá TAKS. Vit skjóta upp, at tað heldur verður ásett meira generelt, at innflytarar og framleiðarar skulu lata upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at áseta og krevja inn pantvirðið og rakstrargjaldið sambært stk. 1.

Fleiri staðni í viðmerkingunum verður eisini víst til innkrevjingarskipanina hjá Taks. Sum vit hava skilt tað, er ætlanin at umhvørvismálaráðið/pantumsitarin ger eina skipan til skráseting

av neyðugu upplýsingunum, sum Taks annars ikki fær í sambandi við innflutning og framleiðslu – slag av íløtum, stødd og tal – og hendan skipan hjá umhvørvismálaráðnum/pantumsitara verður knýtt at innflutnings- og framleiðsluskipanini hjá Taks, soleiðis at pantvirðið og rakstrargjaldið kann verða kravt inn samstundis og saman við avgjaldi sambært lóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

Taks hevur annars ikki viðmerkingar til uppskotini.

Lógaruppskotið er rættað samsvarandi viðmerkingini frá TAKS.

Rúsdrekkasøla Landsins

Pantstøðir og innsavningarstøð
Soleiðis sum lógin er sett saman i dag, er kanska eitt insitament til ikki at hava góða móttøku av íløtum, tí fleiri íløt, jú meira kostnaðarmikið arbeiði. Vit meina, at tað eigur at verða hugt at tí íslendsku skipanini, har pantumsitarin hevur øll innsavningarstøðini og harvið eisini útreiðslurnar. Innflytarar og framleiðarar kunnu so gjalda umsitingargjald til pantumsitaran, í mun til innflutning og framleiðslu. Hesar móttøkur kunnu so staðsetast strategisk runt landið. Soleiðis sleppa smærri handlar og øll onnur eisini undan at gera íløgur í stórar maskinur og dyr høli.

Sambært kanningum, sum IRF hevur gjørt, skulu í minsta lagi fimm pantstøðir gerast kring landið, um henda loysnin skal veljast. Kostnaðurin av hesum verður helst ikki minni enn 20 milliónir, og aftur at tí kemur so kostnaðurin av í minsta lagi fimm starvsfólkum, viðlíkahaldi og nýíløgum. Mett verður, at kostnaðurin av hesum verður størri enn av eini skipan, har sølustøðini taka ímóti. Lógaruppskotið forðar tó ikki fyri, at hetta verður gjørt, um tað verður neyðugt.

Í fyrsta umfari er ætlanin at gera eina skipan, har fólk eins og í dag lata íløt inn á sølustøðum, og á teimum fundum, sum hava verið við handilsvinnuna, hevur undirtøka verið fyri hesum.

Orðið "kann"
Orði "kann" er nógv brúkt í lógini og kann hetta tykjast´, at lógin verður veik og kann vendast, alt eftir hvørs eygu hyggja at henni. Vit meina at lógin skal brúka orðið "kann" minni og ístaðin kanska brúka "skal" ella líknandi fyri at gera lógina eitt sindur meira greiða og ikki at misskilja.

Lógaruppskotið byggir á ta hugsanina, at landsstýrisfólkið sambært § 2, stk. 1, ásetur reglur fyri, hvussu pantskipanin skal setast saman.

Restin av lógaruppskotinum fylgir hesi somu hugsanini við at geva landsstýrisfólkinum nærri ásettar heimildir, sum kunnu brúkast eftir tørvi

Tí gongur orðið "kann" so ofta aftur í lógaruppskotinum heldur enn orðið "skal".

Tað er ikki so nógv í lógaruppskotinum, men meira í kunngerðaruppskotinum, at landsstýrisfólkið ásetur reglurnar, sum pantskipanin verður stýrd eftir. Tí hevur tað ongan týdning fyri greidleikan í lógaruppskotinum at seta "skal" inn fyri "kann".

Sí meira um orsakirnar til heimildarásetingarnar í nr. 2.14 í teimum almennu viðmerkingunum.

Tvær, tríggjar ella fleiri sorteringar
Vit hava fingið at vita at sorteringar av íløtum skulu verða tvær - plast/aluminium og glas. Vit skilja hesa skipan soleiðis at hesar báðar skiljingarnar verða koyrdar í bulk til pantumsitaran, tað verið seg í sekkjum, stórum kassum ella øðrum, heil íløt ella kroyst/knúst íløt. Soleiðis sum vit skilja lógina, er hon í stóran mun gjørd til einnýtisíløt, men hvat við endurnýtsluíløtum til føroysk bryggjarí. Skal hetta verða ein triðja sortering í fløskukassar ella hvussu?

Ætlanin er, at alt glas fer í sama sekk, og at pantumsitarin so skilur fløskur frá til endurnýtslu hjá føroyskum framleiðarum.

[§3 stk. 1 í lógini]
Vit meina at privat felag skal strikast úr hesari greinini. Vit meta at hetta letur upp fyri at privatir aktørar koma inn við vinningi fyri eyga, sjálvt um tað stendur annarleiðis í lógini. Tað at privatir verða nevndir, meta vit er ein glíðibreyt.

IRF er eitt íognarfelag og ikki ein almennur myndugleiki, so tað er neyðugt at hava hesa ásetingina við.

Havast skal í huga, at Dansk Retursystem er ein privat fyritøka, sum skal reka ta donsku pantskipanina uttan vinning, og hetta hevur eydnast sera væl, uttan at talan hevur verið um nakra glíðibreyt.

[§ 4, stk. 4, í lógini]
Hvat við tollfríðum vørum? Onkrar tollfríðar vørur hava somu strikukodu sum vørur á landi. Onkuntíð hendir at tollfrítt verður selt til okkurt skip. Vit og onnur vita ikki um hetta skipið kemur aftur til Føroya innan stutta tíð, men tað kann væl henda. Hetta kann henda sjálvt um skipi ikki regluliga er í Føroyum. Soleiðis risikerað vit eisini her, at tollfrítt kemur inn í skipanina. Vit meina tí at best hevði verið um pant var á øllum vørum, eisini á tollfríðum vørum.

Pant er á øllum vørum fevndum av § 2, tollfríum ella ikki, og ein av uppgávunum hjá IRF, um lógaruppskotið verður samtykt, verður at fáa greiðu á saman við framleiðarum og innflytarum, undir hvørjum umstøðum tað skal vera møguligt at bera pant og rakstrargjald aftur. Sí meira um hetta í teimum serligu viðmerkingunum til § 3 í lógaruppskotinum.

§1 stk. 2 í kunngerðini [sum heimilað í § 2, stk. 2, í lógaruppskotinum]
Her stendur um ymisk undantøk fyri pant, so sum kaggar, størri dunkar osfr. Vit meina at smærri fløskur so sum miniaturur eisini skulu hava undantak. Hetta er reint praktisk. Fløskuautomatirnar klára ikki at taka hesa fløskurnar. Tí meina vit at íløt undir 15 cl. skulu eisini verða undantikin pant.

Kunngerðaruppskotið er nú rættað, so at íløt, sum rúma úr 15 sentilitrum og upp í og við 20 litrum eru fevnd av lógini.

§7 stk. 7 [í kunngerðaruppskotinum sum heimilað í § 7 í lógaruppskotinum]

Tað er forstáiligt at eitt felag av onkrari orsøk skal strikast, t.d.. við uppathald. Men alt annað líka hevur pantumsitarin fingið pening fyri seldu íløtini, so her hevði verið uppá sítt pláss, at haft eina skiftistíð uppá einar 3-4 mánaðir áðrenn vørurnar verða endaliga strikaðar, soleiðis at kundin hevur ein møguleika at fáa sítt pant aftur.

Talan er um møguleikan at rudda út í skipanini, so at til ber at strika óvirknar innflytarar ella framleiðarar.

Íløtini verða bara strikað sum knýtt at tí ávísa innflytaranum ella framleiðaranum; tey verða ikki strikað úr skipanini, so at pant ikki fæst fyri tey.

§8 stk. 6 [í kunngerðaruppskotinum sum heimilað í § 5 í lógaruppskotinum]
Fyri brúkarans skyld mæla vit til, at bryggjaríini eisini skulu taka móti øllum íløtum. Meiningin í lógini er, at tað skal verða so ómakaleyst fyri brúkaran at sleppa av við síni íløt.

Ásett er nú í § 8, stk. 6, at eitt bryggjarí, sum tekur av hesum møguleikanum, sjálvt má syrgja fyri og gjalda fyri at flyta pantumsitaranum tey tómu íløtini frá sølustaðnum. Hetta er sostatt ikki ókeypis hjá bryggjaríunum og kann spara pantskipanini nakað av flutningskostnaði.

Tað var Føroya Bjór, sum umboð fyri føroyska framleiðslu hjá Handilsvinnufelagnum, sum í sambandi við arbeiðið við tí nýggju pantskipanini setti fram hetta ynskið um undantak. Mett verður ikki, at tað elvir til nakran serligan mismun fyri skipanina sum heild, við tað at ábyrgdin av at flyta íløtini fylgir við.

§14 stk. 3 [í kunngerðaruppskotinum sum heimilað í § 10, stk. 4, í lógaruppskotinum]
Í §14 stk. 3 stendur at pantumsitarin kann biðja um at grannskoðan verður framd viðv. rættleikanum hjá framleiðara ella innflytara fyri at eftirkannað rættleikan. Um so er at alt er rætt, so skal pantumsitarin gjalda grannskoðanina og um ikki alt er rætt, so er tað innflytarin ella framleiðarin, ið skal gjalda grannskoðanina.
Hetta samsvarar ikki við [§10 stk. 4] í lógini, ið sigur at innflytarin ella framleiðarin skal gjalda grannskoðanina. Her skal innflytarin ella framleiðarin gjalda óansæð.

§ 14 í kunngerðaruppskotinum er strikað, so at tað nú bara er landsstýrisfólkið, sum sambært § 10 í lógaruppskotinum er eftirlitsmyndugleiki, og heimildin til grannskoðan er somuleiðis strikað.

Handilsvinnufelagið

Fyrst er at siga, at Handilsvinnufelagið fegnast um, at pantskipanin nú tykist at gerast veruleiki. Hetta hevur verið ein long tilgongd, og Handilsvinnufelagið heldur hetta vera eitt týðandi stig á leiðini, sum fer at gagna umhvørvinum, handilsvinnuni og borgaranum. Handilsvinnufelagið tekur yvirskipað undir við uppskotinum, men metir samstundis, at uppskotið hevur ávísar manglar, ið eru týðandi fyri, at skipanin fer at virka so effektivt sum gjørligt.

Ein pantnevnd eigur at verða sett
Við heimild í uppskotinum til løgtingslóg leggur uppskotið til kunngerð upp til, at L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, IRF, skal umsita, reka og hava eftirlit við

pantskipanini. Samstundis leggur uppskotið upp til, at innflytarar og framleiðarar skulu gjalda eitt rakstrargjald fyri hvørt innflutt ella framleitt ílat. Hetta rakstrargjaldið skal vera við til at figgja pantskipanina. Uppskotið leggur harafturat upp til, at IRF ásetur árliga rakstrargjaldið uttan aðrir partar hava nakað at siga, tó at landstýrisfólkið endaliga skal góðkenna ásetta rakstrargjaldið.

Í § 12 í kunngerðaruppskotinum sum heimilaðari í § 2, stk. 5, í lógaruppskotinum er ásett, at innflytarar og framleiðarar skulu hava eina frágreiðing og hoyrast, áðrenn nýtt rakstrargjald kann verða ásett. Hetta so at teir fáa møguleikan at viðmerkja, hvat ið kann gerast betur.

Handilsvinnan er - um nakar - dugnalig til at effektivisera seg. Hetta kemst av, at ein áhaldandi effektivisering í handilsvinnuni er neyðugt og ein grundleggjandi fortreyt fyri framhaldandi at vera kappingarfør. Handilsvinnufelagið mælir tí til, at tað í sambandi við pantskipanina verður sett ein nevnd, ið skal vera við til at tryggja, at skipanin til eina og hvørja tíð er effektivt skipað og virkar sum best.

Tað er handilsvinnan, ið dagliga skal fyrihalda seg til og gera sítt til, at pantskipanin er so smidlig sum gjørligt, so at føroyski borgarin ómakaleyst kann sleppa av við alt sítt pant á einum staði. Handilsvinnufelagið metir tí tað vera sera umráðandi, at praktiska fyriskipanin av pantskipanini er so effektiv sum gjørligt. Í eini effektivari pantskipan liggur eisini, at skipanin til eina og hvørja tíð kann halda kostnaðin av skipanini so langt niðri sum gjørligt.

Handilsvinnufelagið skilir tí ikki, hví ein pantnevnd ikki er partur av uppskotinum. Handilsvinnufelagið hevur í fleiri umførum gjørt Umhvørvismálaráðið varugt við tørvin á eini slíkari nevnd. Handilsvinnufelagið mælir tí staðiliga til, at ein pantnevnd verður partur av uppskotinum, so at allar fortreytir fyri einari effektivari pantskipan eru til staðar.

Handilsvinnufelagið mælir í hesum sambandi til, at ein slík nevnd verður umboðað av teimum aktørum í handilsvinnuni, sum í gerandisdegnum fara at hava við pantskipanina at gera. Ein slík nevnd eigur tí at hava umboð fyri innflytarar, framleiðarar og sølustøð við. Hetta fyri at tryggja at pantskipanin til eina og hvørja tíð er so effektiv sum gjørligt og at skipanin er so kostnaðareffektiv sum gjørligt.

IRF verður pantumsitari sambært avtalu við Umhvørvismálaráðið (§ 3, stk. 1, í lógaruppskotinum) og fer sum pantumsitari at hava alla ábyrgd av at byggja pantskipanina upp og at umsita hana sambært lógini. Tí er avgerandi, at IRF kann góðtaka tær skyldur, sum avtalan og lóggávan leggja á IRF.

Ein pantnevnd verður partur av skipanini, men nevndin verður ráðgevandi og kann gera av, hvussu IRF byggir upp, umsitur og rekur pantskipanina.

Ásett er nú í § 3, stk. 6 í lógaruppskotinum, at landsstýrisfólkið ásetur reglar fyri einari pantnevnd at ráðgeva um íløgur og rakstur. Hvussu hendan nevndin skal skipast, og á hvønn hátt hon skal arbeiða verður fyrst ein partur av avtaluni millum Umhvørvismálaráðið og IRF, so at nevndin kann verða við í arbeiðinum at byggja upp pantskipanina. Farið verður beinanvegin undir at orða avtaluna, um lógaruppskotið verður samtykt, og tá verða eisini samráðingar tiknar upp við Handilsvinnufelagið um pantnevndina.

Tá leisturin fyri pantnevndina er fingin upp á pláss í avtaluni, verður áseting gjørd í kunngerðaruppskotinum um pantnevndina samsvarandi leistinum í avtaluni.

Bensinstøðir eiga í vissan mun at verða undantiknar
Í grein 8, stk. 7, í uppskotinum til kunngerð eru listaði tey sølustøð, ið eru undantikin móttøkuskyldu av panti. Her kunnu m.a. nevnast matstovur, barrir, kaffistovur, móttøkur á hotellum o.o..

Tað tykist ikki sum, at uppskotið leggur upp til, at bensinstøðir eru fevndar av undantøkunum. Grein 8, stk. 7, nr. 7, fevnur tó um sølustøð, sum vanliga ikki ella bara í sera avmarkaðan mun selja matvørur og bara selja heilt fáar pantvørur, sum t.d. amboðshandlar, timburhandlar og venjingarmiðstøðir. Handilsvinnufelagið mælir í hesum sambandi til, at bensinstøðir eisini verða fevndar av undantøkunum.

Veruleikin er tann, at fleiri av bensinstøðunum kring landi eru sera lítlar og hava tí ógvuliga avmarkaða pláss. Hjá hesum smáu bensinstøðunum er ógjørligt at taka ímóti panti, tí tær hava ikki neyðuga plássið. Handilsvinnufelagið skal gera vart við, at vinnan tekur pantskylduna í álvara og vil fegin, á teimum støðum har tað er gjørligt, røkja sína móttøkuskyldu. Tá tað á summum bensinstøðum er ógjørligt at húsa pantinum, eiga bensinstøðir tí at hava møguleika fyri at verða undantiknar móttøkuskylduni.

Bensinstøðir fara sambært § 9 í kunngerðaruppskotinum sum heimilaðari í § 9 í lógaruppskotinum at hava møguleika at gera avtalu við onnur sølustøð um móttøku sína vegna og soleiðis verða undantikin móttøkuskylduni.

Har ið ikki er møguligt at gera avtalu, eru bensinstøðirnar ikki øðrvísi stillaðar enn handilin í Nólsoy við atliti at rættindum og skyldum. Pantumsitarin skal heinta íløt so títt, at tey ikki rúgvast upp á sølustaðnum, bensinstøðin kann leggja sínar móttøkutíðir, tá ið best liggur fyri, og pantumsitarin kann veita stuðul til eyka goymslu, um tað sparir honum flutningskostnað. Sí eisini svarið til viðmerkingarnar frá Matvørubúðini í Nólsoy á síðu 8 omanfyri.

Ætlanin er ikki at gera undantak fyri bensinstøðir.

Føroya Bjór

Vit skilja at høvuðsendamálinum við uppskotinum til lógina er, at viðskiftafólk skulu sleppa av við øll síni pant áløgdu íløt á einum og sama stað.

Trupulleikin at viðskiftafólk ikki sleppa av við øll síni pant áløgdu íløt á einum og sama stað skyldast, at tað verður innflutt sama vøra frá ymiskum veitarum, við ymiskum strikukotum.

Føroya Bjór hevur onga ábyrgd av trupulleikanum. Vit hava eina vælvirkandi skipan við innheintan av okkara íløtum. Við verandi lóg hevur Føroya Bjór havt eitt returprosent omanfyri 94%. Vit meta ikki, at hetta kann vera hægri.

At summar fløskuautomatir ikki taka ímóti summum íløtum, tí strikukodurnar eru ymiskar, sjálvt um íløtini sýnast at vera tey somu, er tann minni trupulleikin.

Tann stóri trupulleikin, sum tann nýggja pantskipanin skal loysa, er, at tað eru so nógvar ymiskar vørur á marknaðinum frá so nógvum veitarum, at fólk ikki altíð sleppur av við øll síni íløt, við tað at sølustøðini bara taka ímóti tí, sum tey sjálv selja.

Hetta veldur eisini nógvum sølustøðum trupulleikar, og nógv arbeiði liggur í at skilja íløtini fyri teir ymisku veitararnar, sum einans heinta egin íløt.

Vit skilja als ikki, at fyri at uppfylla høvuðsendamálið, so skal ein eyka skattur/avgjald leggjast á Føroya Bjór uppá kr. 4.000.000. Føroya Bjór hevur seinastu 3 árini havt árligt úrslit niðanfyri hesa upphædd, og tað kann als ikki góðtakast.

Støddin á rakstrargjaldinum er roknað út eftir metta kostnaðinum av at seta pantskipanina á stovn, t.d. keyp av maskinum, hølisumbygging til maskinurnar og keyp og menning av ritbúnaði og leypandi kostnað av rakstri t.d. lønir, leiga av høli, viðlíkahald og flutningur.

IRF metur, at tørvurin fyri fígging verður umleið 7,5 mió. tað fyrsta ári, og hetta svarar til 50 oyru fyri hvørt av teimum umleið 15 mió. íløtunum, sum pantskipanin vantandi skal handfara, frá tí hon fer at virka í oktober 2025 og teir næstu 12 mánaðirnir.

Rakstrargjaldið verður árliga ásett av nýggjum sambært § 12 í kunngerðaruppskotinum, sum heimilað í § 2, stk. 5 í lógaruppskotinum, so tað er væl møguligt, at rakstrargjaldið við tíðini fer at lækka, tá byrjanarkostnaðirnir eru útgoldnir (sí meira um hetta á síðu 15 um munin á føroyskum rakstrargjaldið og donskum driftsgebyr)

Rakstrargjaldið verður tað sama fyri innflytarar og føroyskar framleiðarar óansæð stødd á ílati og hvat tilfar ílati er gjørt úr og hetta er ein fyrimunur fyri tær vørur, sum Føroya Bjór selur í glasfløsku til endurnýtslu, tí sjálvt um tað fer at kosta pantskipanini meira at handfara hesar glasfløskur, við tað at tær skulu skiljast frá einnýtsluglasi, koyrast í kassar og útflýggjast bryggjarínum, so stendst eingin eykakostnaður av hesum fyri Føroya Bjór. Tað er ein fyrimunur fyri umhvørvi, at íløt verða endurnýtt so ofta sum gjørligt, og hesum stuðlar ætlaða pantskipanin við at taka ein eindarprís fyri endurnýtsluíløt og einnýtsluíløt, sjálvt um handfaringin av endurnýtsluíløtum verður dýrari.

Vit eru sera væl nøgd við tað arbeiði, ið IRF ger við at savna og viðgera burturkast, men hetta lógaruppskot leggur upp til ein blankochekk til IRF, frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, fíggjað av ma. Føroya Bjór.

- *Tað er ásett í lóg at IRF skal fáa 0,50 kr. í ómaksgjaldið fyri hvørt pant álagt ílat, ið verður innflutt ella framleitt í Føroyum*
- *IRF fær ágóðan av yvirskotspanti, sum ikki verður innlatið aftur.*
- *IRF kann selja brúkt íløt til endurnýtslu*

Pantumsitarin kann ikki nýta nakra inntøku frá pantskipanini til nakað annað endamál enn pantskipanina, tí sambært § 3, stk. 1, í lógaruppskotinum skal pantumsitarin ikki hava vinning av pantskipanini, og sambært § 2, stk. 5, ásetur landsstýrisfólkið reglur fyri, hvussu rakstrargjaldið verður ásett.

Í samsvari við hesar ásetingarnar verður staðfest í § 12, stk. 4, í kunngerðaruppskotinum, at avlop av sølu av tilfari frá íløtum og avlop av vantandi returpanti skal nýtast til útreiðslur av pantskipanini. Møguligt avlop av hesum er tí ein inntøka, sum skal takast við, tá ið nýtt rakstrargjald verður ásett.

Tað er ásett í lógini, at IRF skal vera pantumsitari. Vit skilja ikki, at ikki verður lagt upp til at søkja um almennt útboð til pantumsitara heldur enn at áseta ein valdan umsitara í lóg.

Undanfarna samgonga hevði eitt uppskot til hoyringar um nýggja lóg um pant á íløtum, sum stuðlaði upp undir, at handilsvinnan sjálv stovnaði eina pantskipan. Hetta uppskotið vann ikki frama hjá handilsvinnuni, sum grundgav við, at vinnan ikki fór ikki at semjast um eina felags pantskipan.

Tað var ikki, fyrr enn IRF varð skotið upp sum pantumsitari, at partarnir í handilsvinnuni søgdu seg kunna góðtaka eina felags pantskipan.

Tí er tað, at lógaruppskotið hevur sum útgangsstøði, at tað verður IRF, sum skal byggja upp, umsita og reka pantskipanina. Hetta kann tó broytast, um tað seinni gerst neyðugt, tí pantumsitarin verður ásettur í kunngerðini sambært avtalu. Berst í framtíðini IRF frá at virka sum pantumsitari, er einki í lóggávuni til hindurs fyri almennum útboði.

Tað er eisini ásett í lógini, at rakstrargjaldið skal vera 0,50 kr. Til samanbering kann viðmerkjast at Dansk Retursystem krevur eitt rakstrargjald á 0,00 kr. pr blikk og 0,06 kr. pr PET fløskur, og hevur yvirskot. (sí bilag 1)

IRF hevur hesar viðmerkingarnar til rakstrargjøldini hjá Dansk Retursystem:

Tað er trupult at bera rakstrarkostnað hjá IRF Pant saman við *driftsgebyr* hjá Dansk Retursystem. Orsakirnar eru hesar:


- Danska pantskipanin umsitur 2 mia. íløt árliga. Føroyska pantskipanin fer at umsita umleið 15 mió. íløt.
- Í 2022 sendi Dansk Retursystem 74.000 tons av plasti, glasi og aluminiumi til endurvinningar. IRF væntar, at tað fyrsta árið verða umleið 248 tons send til endurvinningar.
- Dansk Retursystem hevur ymiskt rakstrargjald fyri vørubólkarnar plast, glas og aluminium. Hetta rakstrargjaldið ber í sær tær útreiðslur, sum eru fyri hvønn vørubólkin, har sølan av rávøruni er góðskrivað. Aðrar útreiðslur er ikki við í hesari útrokningini, men kosta eyka, millum annað útreiðslur av at melda nýggj íløt til. IRF Pant hevur gjørt av at hava sama rakstrarkostnað fyri øll íløt og ikki taka annan eyka kostnað.
- IRF hevur nakrar byrjanaríløgur, áðrenn skipanin kann fara í gongd. Hesar íløgurnar gjørdi Dansk Retursystem í 2002, tá ið tey byrjaðu sítt virksemi.

Hetta sigur Dansk Retursystem um orsøkina til, at rakstrargjaldið í 2023 var 0 oyrur:

> "Som følge af usædvanligt høje priser på genanvendeligt materiale set i et historisk perspektiv, vil de forventede indtægter fra salg af genanvendeligt materiale i 2023 medføre, at det faste driftsgebyr vil være 0 øre i 2023. Da der er tale om en usædvanlig situation for prisdannelsen på markedet for genanvendeligt materiale kan det ikke forventes, at der også i årene fremover vil være tale om driftsgebyrer på 0 øre."

Talvan niðanfyri greinar inntøkugrundarlagið hjá Dansk Retursystem.

Her sæst týðiliga, at hægri inntøkur eru av vantandi returpanti og sølu av endurnýtslutilfari.



”

§1 í kunngerðini verður víst á fleiri nummur í toll- og vøruskránni. Men vit undrast á, at tað verður víst á somu tollnummur fleiri ferðir, og víst á ávíst innihald. Vil tað so siga at td. torskild 2202.99.19 (Íste) er ikki fevnd av pantskipanini? Er td. pant á Cocio ella FIT hjá MBM?
Hesar ásetingar meta vit vera ov torskildar.

§ 1 í kunngerðaruppskotinum er nú rættað í samráð við TAKS, so at hon er lættari at yvirskoða og tað er greiðari, at íløt úr plasti, glasi og metali til allar drykkjuvørur og konsentrat til drykkjuvørur eru fevnd av lógini, so leingi drykkirnir ikki bera mjólk ella mjólkarúrdráttir í sær. Tað merkir, at Cocio, sum ber mjólk í sær, og FIT, sum ber mjólkarúrdráttir í sær, ikki eru fevnd av lógini. Íste er fevnt av kapitli 2202 í vøruskránni.

Í sambandi við arbeiðið at gera pantskipanina klára verða vegleiðingar og onnur kunning framleiddar, sum fara at svara teimum vanligastu spurningunum pantskipanini viðvíkjandi.

Orsøkin til, at drykkir við mjólk ella mjólkarúrdráttum ikki eru fevndir av pantskipanini, er, at mett verður, at størri reinføristrupulleikar standast av slíkum íløtum enn av íløtum til aðrar drykkjuvørur.

Hetta skilst millum annað á síðu 20 í “Miljøprojekt nr. 896 2004. Affaldshåndtering af udvalgte engangsemballager”:

> “For mælkedunke og plastbakker til convenience-produkter vurderes tilbagetagning via butikkerne ikke at være en realistisk løsning på grund af hygiejniske og tekniske problemer.”

Íløt til mjólk og mjólkarúrdráttir eru heldur ikki partur av tilmælinum frá evropakommissiónini um felags lóggávu á m.a. pantøkinum, sum er at finna á síðu 22 í "Samlenotat Rådsmøde (miljø) den 16. marts 2023" frá Miljøministeriet í sambandi við "Kommissionens forslag til forordning om emballage og emballageaffald":

> "Kommissionen foreslår desuden, at alle medlemslande fra 1. januar 2028 skal have et pant- og retursystem for engangsdrikkevareemballager i plast og metal. [....] mælkebaserede produkter er dog undtaget."

Vit halda, at pant skal vera nemt og greitt fyri viðskiftafólk og handlar. Tað skal síggjast á ílatinum, um tað hevur pant ella ikki. Hetta kann gerast við lóg, at á hvørjum pant áløgdum ílati, ið verður selt í Føroyum, skal vera eitt føroyskt pantmerkið.
Tað Føroyska pantmerkið skal greitt tilskila, um pant er álagt og hvat virði á pantinum er. Hetta vil greiða fleiri ivamál, hjá viðskiftafólki og sølustøðum.

Mett verður ikki, at neyðugt er at hava pantmerki á íløtum seldum í Føroyum. Um ein drykkjuvøra ella úrdráttur at gera drykkjuvøru burturúr ikki ber mjólk ella mjólkarúrdráttir í sær, er drykkjuvøran fevnd av lógini, eins og ílatið er, um tað annars er úr plasti, glasi ella metali. Stingur okkurt ivamál seg upp, fer at bera til hjá einum og hvørjum at lesa strikukoduna á ílatinum við eini app frá pantumsitaranum, sum beinanvegin kann vísa, um pant er á tí ella ikki.

Dansk Retursystem hevur sítt egna pantmerki, sum við lóg ikki er loyvt at útflyta.
Í viðmerkingunum til §5 verður boða frá, at Umhvørvismálaráðið samráðist við Miljøminiseriet, at gera tað lagaligari fyri føroyskir innflytara at umgangast Dansk Retursystem.

Donskum framleiðarum er loyvt at flyta út vørur við pantmerki, men teir skulu krevja pant fyri íløtini at gjalda Dansk Retursystem. Umhvørvismálaráðið hevur heitt á Miljøministeriet um at geva undantak frá panti fyri útflutning til Føroya, men enn er Miljøministeriet ikki komið til nakra niðurstøðu.

Lógin leggur eisini meinbogar fyri útflutning hjá føroyskum framleiðarum. Framyvir skulu vit rinda pant og rakstrargjald til IRF, fyri hvørt ílat vit útflyta, fyri síðan at standa við hattinum í hondini uttanfyri hjá IRF, og pent spyrja um vit kunnu fáa peningin aftur frá teimum. Um IRF sigur nei, so kann tann avgerðin ikki kærast. Hetta skapar meiri bureaukrati enn gott er.

Í sambandi við arbeiðið at áseta neyvari treytir fyri afturbering, og áðrenn lógin ætlandi kemur í gildi, fara IRF og Umhvørvismálaráðið at samráðast við vinnuna um treytirnar fyri afturbering og avráða mannagongdir hesum viðvíkjandi, so at afturberingin verður so sjálvvirkandi og løtt at umsita sum gjørligt. Sí meira um afturbering í teimum serligu viðmerkingunum til § 3.

Ásetingin um, at avgerðir um afturbering ikki kunnu kærast er strikað úr § 13 í kunngerðaruppskotinum.

Føroya Kærustovnur

Føroya Kærustovnur viðmerkir, at tá avgerð verður tikin sambært § 11 um leggja kærumyndugleikan til sin, er neyðugt at fáa hetta gjørt í tøttum samstarvi millum Føroya

Kærustovn og tey avvarðandi aðalráðini, so at tryggjast kann, at flytingin er væl fyrireika og umhugsað, og at neyðug figging og arbeiðsorka fylgir við.